# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fríðbjørg Højgaard 75 ár

Nú fríggjadagin, 17. februar, verður Fríðbjørg Højgaard, (f. Joensen) í Rituvík 75 ár. Hon er fødd í 1931 á Hvítanesi. Mamman, Elisabeth, var fødd Jensen og ættað úr Sumba, meðan pápin, Dánjal Joensen, í móðirætt var ættaður frá fyrstu niðursetufólkunum á Hvítanesi (Didriksen-ættin). Elisabeth og Dánjal fingu seks børn; men longu í apríl 1941 fórst Dánjal við ”Guiding Star”, og kom hon tí at vaksa upp hjá gubba sínum, Volmar Bech, giftur við Fridu á Tvøroyri. Har treivst hon væl og var tað ein tíð, ið hon mangan hevur fortalt okkum børnunum um.

Fríðbjørg tók realskúlaprógv á Tvøroyri í 1947 og fór sama ár í skrivstovulæru á Líkningarráð Føroya, ið fyrst helt til á Kongabrúnni, men seinni flutti út í Tinganes. Har kom eisini Landsfólkayvirlitið at hoyra til, og her kom Fríðbjørg at arbeiða í 8 ár.

Í Havn hitti hon mann sín, Andreas S.J.S. Højgaard, ið tá gekk á stýrimansskúla. Tey giftust í 1953, og fluttu til Rituvíkar í 1955. Tey fingu børnini Dánjal Petur, Janu, Volmar, Evu, Irenu, Guðrið, Áka og Tóka. Í Rituvík



kom Fríðbjørg at halda hús og seinni eisini at taka sær av verforeldrunum Janu og Dánjal Petur. Hetta eins og alt annað húsligt arbeiði varð gjørt við einum sjáldsomum hegni og góðum arbeiðslagi, har alt bar til. Uppaling av 8 børnum, ansing av neytum, seyði og fenaði, meðan maðurin sigldi. Jú, alt kom væl undan, ið Fríðbjørg - – mamma og omma okkara – fekst við.

Heppin var hon eisini við grannalagnum í býlinginum Handan fyri Brekku, har hjálpsemi og góðvilji var eyðkenni fyri øll húsini har. Hon tók lut í mongum virksemi. Hevði t.d. handarbeiðsskeið heima við hús frá vetrinum 1958-59 og til Nýggi Skúli varð tikin í nýtslu.. Rituvíkskvinnur tóku væl undir við hesum skeiði og mangt eitt dygdar handverk bleiv virkað og tilgjørt - til egna nýtslu ella til basarar. Tá ið váraði, kundi tú frøast yvir eina prýðiliga framsýning í Gamla ella Nýggja Skúla. Mangt er at minnast, tað er vist. Væl hevur eisini ligið fyri við tí handaliga. T.d. hevur Fríðbjørg seinnu árini og til fyri kortum broderað øllum synum og døtrum og flestu ommubørnunum (10 í tali) vestar, turrikløð og fyrikløð til føroysk klæði. Ikki bara okkurt hissini, men satt listahandverk!

Eftir at tey flestu børnini vóru farin burtur í læru, fór hon sjálv eisini í skúla aftur. Var t.d. á læraraskeiði hjá Maritu Petersen, sálu, á Fróðskaparestrinum. Hevur eisini virkað sum vikarur við Runavíkar Skúlaverk í umleið 12 ár, mest í Rituvík. Sangur hevur staðið hennara hjarta nær, og hevur hon sungið í kóri úti við 50 ár. Tey fyrstu árini við Havnar Sangfelag, fyrst stjórnað av Gunnari Mikkelsen, seinni av Hans Jacob Højgaard. Í Eysturoynni hevur hon sungið í Kór Glyvra Kirkju og Eystankórinum, bæði stjórnaði av Símuni Nónklett. Hon var við til at stovna Eysturoyar Heimavirki, har hon var nevndarlimur og skrivari í nógv ár. Til fyri kortum hevur hon eisini staðið handan diskin í heimavirkinum – og kunnað leiðbeint og ráðgivið teimum, ið skuldu keypa ella spyrja um føroysk pløgg ella og klæði. Nú hon rundar tey sjútifimm, er hon framvegis birg og virkin. Beint nú kanska mest við hús í Rituvík, har hon – umframt at klára alt tað húsliga sjálv – eisini tekur hond í vakra urtagarðinum kring húsini.

Hjá Fríðbjørg og Andriasi hava mong sitið væl og notið hjartaligan blíðskap, har hann finst bestur í einum føroyskum heimi. Tillukku, góða mamma og omma! Tøkk fyri stríð og strev í øll hesi ár, ið farin eru. Harrin signi leiðina fram.

**-børn og ommubørn**

## Halldis í Smiðjuni



*Fríggjadagin 17. februar letur Halldis Olsen upp ein framsýning í Smiðjuni við 14 surrealistiskum málningum umframt grafiskum prenti og tekningum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin 17 februar hevur 22 ára gamla havnargentan, Halldis Olsen, framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Halldis byrjaði á ungum árum at fáast við list í Heinesenshúsi, ið Bent Bruun Hansen settið á stovn.

Eftir lokið studentsprógv leitaði hon sær til Danmarkar, har hon í eitt ár gekk á listaháskúla.

Á framsýningini sýnir Halldis fram málningar, prent og tekningar ið hon hevur gjørt í Danmark.

Framsýningin, sum altso letur upp fríggjadagin, er opin til týsdagin 21. februar. Allar dagar millum klokkan 16 og 20.

Í sambandi við ferniseringina fríggjadagin fer Hornorkestrið hjá Frelsunarherinum at hava framførslu, og byrjar hendan kl. 16.30.

**-mørk**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Betrea Jacobsen**, Miðvágur, fer til gravar úr Miðvágs kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr Sálmabókini. Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 16.

Tey, sum vilja minnast Betreu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu.

**Heri Hartmann Niclasen**, Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin, 15. februar, 60 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum leygardagin kl. 17 í Tøroyrar Kirkju. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar Kirkju sunnudagin kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Hera, kunnu lata eina peningagávu. Konta í Føroya Banka.

**Eileen Thomsen**, Lopra, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 14. februar, 74 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum til Smyril fríggjadagin, 17. februar, kl. 11.

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju í kirkjugarðin á Leitið leygardagin, 18. februar, kl. 13.30.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hjørdis Johannesen**

doyði og varð jarðað.

Takk til tykkum, ið vitjaðu hana.
Til Lágargarð, hjartaliga tøkk fyri sera góðu og kærleiksfullu røkt og umsorgan.

**Børnini**

## Tøkk

Stóra tøkk til tykkum, sum sýndu samkenslu, tá góði maður mín, pápi, abbi, verpápi og beiggi okkara

**Johannes Petersen**
Vágur

andaðist og fór til gravar.

Takk til Jónsvein prest og Patrick prest fyri góð orð.
Takk til sangkórið Ljómur fyri vakran song í kirkjuni og tøkk til heimahjálpina og heimasjúkrasystrar í vóru um hann, ta tíðina hann var heima.
Takk til Røktarheimið fyri tað tíð honum untist at vera har og takk fyri heilsanir og gávur til Vágs kirkju.
Takk øll somul.

**Martha, Dion, Ella, Jóannes og Rógvi**